# Heimsins besta talvland – ein samfelagsbúskaparstrategi

BOGI ELIASEN
cand.scient.pol



VINNUSÍÐU-ANALYSAN

Seinastu árini hava vit sæð eina støðuga gongd, har arbeitt verður við at leggja ein leist fyri Føroyar.

Talan er bæði um vinnliga, útbúgvingarliga og ikki minst altjóða. Partar av hesum eru komnir fram í Hvítu Bók, Vinnurítum og 2015 málunum. Hóast semjurnar ikki altíð tykjast breiðar, so er tó semja um, at Føroyar sum eitt lítið land má fokusera á einstøk økir. Men so er ikki semja um meira enn tað. Tað merkir, at vit sum eitt sera lítið land leggja okkum eftir at verða bestir á einstøkum økjum, sum so antin kann verða lokomotivið at betra onnur økir við eisini, ella sum letur dyr upp og vinnur pening inn, soleiðis at onnur økir kunnu fíggjast til at hava minst sama støðið sum lond, vit samanbera okkum við.

## Røttu hugskotini

Langtíðarætlaniratrøkkaslíkum málum mugu hyggja eftir øllum pørtum í samfelagnum og meta um hvar neyðugt er at betra seg, og um hvørjar betringar geva størsta íkastið til heildarúrslit. Tað skal við øðrum orðum ein beinhørð raðfesting til. T.d. kann tað verða, at broytingar av fólkaskúlanum kunnu hava størri ávirkan, enn stórar íverksetanarskipanir, eins væl og tað kann verða øvugt. Vit hava t.d. nógvu seinastu árini sæð, at Føroyar klára seg sera væl í business games kappingum og at hugflogið er stórt, tá handilsskúlarnir hava ung virki kappingar. Um talið av smávirkjum í Føroyum er ov lítið, veit eg ikki. Fokusið eigur at verða á at veruleikagera góð hugskot. Tí kann tað verða, at tað ikki er áræði at hava sítt egna, men heldur eginleikin at leggja til rættis, hvussu góð hugskot skulu gerast til succesir, sum er tað ið skal til.

## Eginleikarnir

Politiskt og vinnuliga tykist tað verða ein semja um, at tað er rætt at satsa uppá kunningar- og samskiftistøkni og biotøkni. Vit hava eitt ávíst virksemi á hesum økjum, men tað skal vaksa munandi, um tað skal verða ein berandi partur í búskapi okkara. Og er semja um at satsa á hesar vinnugreinar, eiga vit so ikki longu í fólkaskúlanum at leggja okkum eftir at styrkja eginleikar, sum tørvur er á í hesum vinnugreinum?. Tað krevur t.d. matematiskan logiskan sans, strategi, tolni, umhugsni og at talv eisini gevur vinnaramentan.

## Talv á skema?

Spurningurin er so um allar lærugreinar skulu broytast. Kanska, men ikki neyðturviliga. Grundleggjandi eginleikar kunnu kanska lærast aðrar vegir. Amerikumenn hava leingi sagt learning by playing, og tað er kanska ein betri máti enn turr innlæring viðhvørt. M.a Peter Dauvergne, hevur víst á, at talvfrálæra ger at børnini klára seg betri. Hetta verður eisini stuðla av fleiri samanberandi kanningum í USA av næmingum sum fáa og ikki fáa talvfrálæru. Spurningurin er um ikki vit høvdu fingið fleiri av ynsktu eginleikunum í fólkaskúlafrálæruna við at hava talvtímar. Talan kundi t.d. verið um at man í triðja flokki hevði talv á skránni hvørja viku eins og ítrótt og evning. Møguleikarnir er stórir fyri at næmingarnir kunnu gera meira við tað sjálvir, tí nógv verður telva í Føroyum, fleiri talvfeløg eru og lætt er at finna talvspøl á alnótini at spæla ímóti. Talan er eisini um eitt altjóða spæl, sum kring allan heim gevur virðing.

## Altjóða elita

Um vit taka ítróttina, so er flestu samd um, at møguleikin fyri at fáa ein altjóða elituíðkara er størstur, har talan er um einmansleik, og kanska minstur har liðini eru størst.

Føroyar eru soleiðis háttaðar, at talv er ein samrunnin partur av mentanini. Talv er ein relativ stór ítrótt í Føroyum og hevur stóran áhuga millum føroyingar. Hetta er eitt spæl, sum ikki krevur annað enn eitt bretti og fólk og kann tí spælast allastaðni og til allar tíðir, uttan størvegis íløgur.

Vit hava sæð seinastu dagarnar, at vit hava ungar evnaríkar telvarar á bæði og kvinnu og mannssíðuni, har Herborg Hansen og Helgi Dam Ziska hava víst styrki.



Gary Kasparov: Ein av talvstórmenninum, sum hava verið í Føroyum

## Altjóða úrslit

Um vit sum tjóð skulu leggja eftir einari ávísari ítrótt fyri at fáa góð altjóða úrslit, so er talv leikurin. Vit hava sterka talvmentan, við okkara framkomna ferðslunetið er lætt at halda landakappingar, eisini fyri børn. Spælið krevur ikki nógv, uttan frið! Vansin í mun til vanliga kropsliga ítrótt er, at telving ikki er stimbrandi fyri fysisku heilsuna, men hinvegin so styrkir telving áðurnevndu eginleikar og tað er eisini vorðin ein partur av yrkistelving at vera væl fyri kropsliga.

## Búskapur

Í dag eru tað bert bestu telvararnir, sum vinna góðan pening. Men talv er eitt spæl, sum er vaksið munandi seinastu árini, og tí kann tað verða ein spurningur um tíð áðrenn talv eisini gerst meira búskaparliga áhugavert enn



Taktikkur og avgerðir, styrkir í talvi